umhvørvisstovan

SP/F Lakkering
Hoyvíksvegur 61
100 Tórshavn

Argir hin 8. februar 2011
Málsnr.: 10/00016-15
Málsviðgeri: Lena Ziskason

# Umhvørvisgóðkenning

# SP/F Lakkering

Henda umhvørvisgóðkenning av SP/F Lakkering, matr. nr. 1326k í Tórshavn, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum seinast broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 6. januar 2010 umsókn um umhvørvisgóðkenning til eina nýggja sproytukabinu hjá SP/F Lakkering í Tórshavn.

Virkið hevur síðan avgjørt ikki at keypa hesa nýggju kabinuna og hevur hin 29. september 2010 sent Umhvørvisstovuni nýggja umsókn. Umsóknin er til eina brúkta sproytukabinu, sum er sett upp í nýggju hølunum.

Saman við umsóknunum og eftirfylgjandi hevur Umhvørvisstovan móttikið fleiri upplýsingar um kabinuna, filtur, rávørur og burturkast.

Tað móttikna tilfarið, umframt vitjan hjá SP/F Lakkering, hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 3. Lýsing av virkseminum

SP/F Lakkering er eitt bilverkstað í Tórshavn. Virkið byrjaði á heysti 2008. Virkið hevur hildið til í hølum á Slættanesgøtu 7. Virksemið fevnir um umvælingar av skaðum á bilar og lakkering av bilum, møblum o.a..

Virkið er flutt í nýggj høli, sum eru á Hoyvíksvegi 61, har ein brúkt sproytukabina er sett upp. Sambært byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, er økið umráðispartur B4. Ásetingin fyri økið er millum annað:
*Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.*

Umhvørvisgóðkenningin umfatar alt virksemi hjá SP/F Lakkering.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Vegna møguliga ampar, skal ein sproytukabina ikki setast upp í einum, ella nærri enn 100 m frá einum dálkingarviðkvæmum økið. Eitt dálkingarviðkvæmt økið er eitt øki, sum sambært byggisamtyktini fyri avvarandi kommunu er lagt til bústað ella blandað bústað- og miðstaðarøkið. Sproytukabinan er meiri enn 100 m frá nøkrum dálkingarviðkvæmum økið.

Útlát frá eini sproytukabinu inniheldur organisk loysingarevni, sum kunnu vera vandamikil, tí verða treytir settar fyri at tryggja at útlátið av hesum evnum verður so lítið sum møguligt. Eisini eru treytir settar til nøgd av litpartiklum í útlátinum.

Sambært ásetingum í okkara grannalondum skulu allar útleiðingar til luft førast uppeftir og hæddin á skorsteinum skal roknast útfrá støðd av sproytukabinu, tó í minsta lagi 8 m yvir lendi og 2 m yvir tak.

Í umsóknini frá SP/F Lakkering, hevur virkið upplýst at virkið ikki útleiðir nakað spillivatn.

Virkið skal miða ímóti at nýta so umhvørvisvinaligar rávørur sum møguligt. Um virkið fer yvir til at nýta aðrar rávørur, sum viðføra broyting í útlátinum av organiskum loysingarevni, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar, sum eru settar í hesi umhvørvisgóðkenning.

Virkið væntar at brúka minni enn 2000 litrar av lakki um ári.

Tað kann koma nakað av óljóðið frá virkseminum, tí eru treytir settar til tað.

### 4.1. Málsviðgerð

Henda umhvørvisgókenning hevur við sær, at SP/F Lakkering kann byrja sítt virksemi, sum virkið hevur lýst í síni umsókn til umhvørvisgóðkenningina. Tað eru settar treytir fyri útlátinum og virkið skal til eina og hvørja tí tryggja sær, at tær ásettu treytirnar verða hildnar.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning vórðu send Tórshavnar kommunu og P/F Lakkering til viðmerkingar tann 23. november 2010.

Tórshavnar kommuna hevði soljóðandi viðmerking:

1. Til treyt 6.3.8 eigur at standa: *Hæddin á skorsteininum **er roknað** út frá.....* Tað eigur at nevnast hvørjar ásetingar ella normar útrokningin er gjørd út frá.

Umhvørvisstovan hevur tikið viðmerkingarnar til eftirtektar.

Tóshavnar kommuna hevði onga viðmerkingtil staðsetingina av vikrseminum hjá SP/F Lakkering.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at virkið ikki elvir til nakrar ampar í nøkrum dálkingarviðkvæmum økið,
- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, havi og jørð, og fyribyrging av ampum av óljóði,
- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum

# 5. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum.

## 5.1. Almennar treytir

5.1.1. Er virksemið ikki byrjað innan eitt ár frá tí at umhvørvisgóðkenningin er lýst, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

5.1.2. Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

5.1.3. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð vera tøk á virkinum og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og vera kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á. Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

5.1.4. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

5.1.5. Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

5.1.6. Í fimm ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir

5.1.7. Aftaná fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

5.1.8. Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum ella loyvi sambært aðrari lóggávu.

## 5.2. Innrætting

5.2.1. Virkið skal innrættast og rekast, sum ávíst í móttiknum tilfari.

5.2.2. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar, soleiðis at virkið kann halda øll útlát so lág sum gjørligt.

---

[1] Best Available Techniques.

## 5.3. Útleiðing til luft

5.3.1. Allar hurðar til sproytukabinuna skulu vera afturlatnar, meðan arbeitt verður.

5.3.2. Lutfallið millum inn- og útsúgving skal til eina og hvørja tíð vera soleiðis, at tað er undirtrýst í kabinuni, meðan arbeitt verður.

5.3.3. Kabinan skal hava filtur, sum fráfiltrerar litpartiklar. Filtrini skulu til eina og hvørja tíð kunna afturhalda í minsta lagi 85% av litpartiklunum.

5.3.4. Útlátið av organiskum loysingarevnum skal ikki vera størri enn 50 mg TOC[2]/norm. $m^3$.

5.3.5. Niðurskrivað mannagongd skal gerast fyri eftirlit og røkt av filtrum.

5.3.6. Nøgdin av dusti í útlátinum skal ikki vera hægri enn 20 mg/$m^3$ (0°C, 1013 mbar, turt gass mátað sum 1 tíma miðalvirði).

5.3.7. Virksemið má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

5.3.8. Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir. Hæddin á skorsteini skal roknast út frá kapacitetinum av sproytukabinuni, tó í minsta lagi 8 m yvir lendi og 2 m yvir tak .

5.3.9. Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 5.4. Goymslur

5.4.1. Goymslur av kemikalium skulu hava tætt undirlag og vera vardar ímóti regni og vindi.

5.4.2. Lekar skulu kunna haldast aftur.

5.4.3. Goymslan skal kunna læsast fyri óviðkomandi.

5.4.4. Flótandi og fast vandamikið burturkast skal goymast í íløtum, sum eru egnað til endamálið, og sum eru merkt, soleiðis at tað sæst hvat er í.

## 5.5. Burturkast

5.5.1. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3] og skal latast til góðkendan móttakara.

5.5.2. Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

5.5.3. Virkið skal regluliga latað burturkast soleiðis at nøgdin á goymsluni ikki verður til nakran ampa.

## 5.6. Óljóð, ristingar og ljós

5.6.1. Óljóð[4] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

---

[2] Total organic carbon.

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

[4] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | mán – frí kl. 07 – 18<br>leyg. Kl. 07 - 14 | mán – frí kl. 18 – 22<br>leyg. kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22 | Allar dagar<br>kl. 22 - 07 |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

5.6.2. Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð 35 dB frá virkseminum hjá SP/F Lakkering.

## 5.7. Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

5.7.1. Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd og slag av rávøru
- Viðlíkahald av reinsiskipanini, so sum filtur o.a.
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

5.7.2. Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í minst fimm ár.

5.7.3. Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk v.m. skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 5.8. Innaneftirlit / Umhvørvisstýrisskipan

5.8.1. Virkið skal gera kanningar av dustútlátinum, fyrstu ferð innan tveir mánaðir eftir at virksemið er byrjað.

Eftir tað kann Umhvørvisstovan krevja, at fleiri kanningar skulu gerast, tó hægst einaferð um árið.

5.8.2. Kanningar av útlátinum skula gerast meðan fult virksemi er í sproytukabinuni.

5.8.3. Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

5.8.4. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av P/F Lakkering.

5.8.5. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð, ristingar og ljós, og um útleiðing til luft, verða hildnar.

5.8.6. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

### 5.9. Óhapp

5.9.1. Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

5.9.2. Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

5.9.3. Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

5.9.4. Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[5].

## 6. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Tórshavnar Kommuna, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn

[5] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).